## Til Skarvanesar

Sunnudagin 26. november verður skipað fyri einum gongutúri til Skarvanesar. Tað eru Sandoyar Kunningarstova og Sandoyar Sýslu Ferðalag, sum skipa fyri túrinum. Fyrireikararnir siga, at ætlanin er at fáa gongutúrin í lag, hóast veðrið hevur verið sera ólagaligt, men teir vóna, at tað fer at skikka sær frægari, og at tað verður eitt sindur turrari leygardagin. Gongurúrurin byrjar við Skarvanesvegin kl. 14, og ferðaleiðari kemur við.

## Noyddist frá

Aðalskrivarin í finska Savningarflokkinum kunngjørdi í gjár, at hann hevur gjørt av at leggja frá sær. Sjálvur segði hann eisnki um orsøkina, men finsku fjølmiðlarnir eru ikki í iva um, at Harri Jaskari er farin frá, tí tað er komið fram, at hann er farin illa við fyrrverandi unnustu síni, og at hann eisini skal hava verið heldur harðligur við onnur. Løgreglan hevur verið uppi í málinum og handaði í gjár ákæruvaldinum eina frágreiðing.



*Í 2005 vórðu 27 børn fødd í Nes kommunu - og 8 andaðust. Nøkur fluttu til kommununa, og onnur fluttu úr kommununi. Nettovøksturin var 16 fólk*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Rættilig ferð komin á sethúsabygging

**Nes kommuna hevði ein nettovøkstur í fólkatalinum í 2005 upp á tilsamans 16 fólk**

KOMMUNUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í ársfrágreiðingini til roknskapin fyri 2005, staðfestir Nes kommuna, at rættilig ferð er komin á sethúsabyggingina í kommununi.

- Fleiri nýggj sethús vórðu bygd í 2005, og fleiri eru í gerð og verða liðug í ár, sigur kommunan.

Lagt verður aftrat, at eftirspurningurin eftir grundøkjum er stórur, og fleiri umsóknir um byggiloyvi eru játtaðar í útstykkingini, Kvíggjarheyggur/ Gadd, har nógv sethús eru bygd seinastu árini.

### Skipanin broytt

Nógv fólk hava eisini biðið um grundøkir aðrastaðni í kommununi – uttanfyri útstykkingina, sum kommunan hevur.

Í slíkum føri hevur verið vanligt at søkja um grundøkini og keypa tey frá Búnaðarstovuni og Ognini. Men nú hevur Búnaðarstovan broytt mannagongd, soleiðis at stovnurin framyvir ikki selir til privatfólk, men bert til kommununa.

- Hetta viðførir, sigur Nes kommuna, at borgarar, sum ætla sær at keypa grundøki á henda hátt, venda sær til kommununa, sum síðan keypir økið frá Búnaðarstovuni og selir víðari til tey, sum ynskja at byggja.

### Fólkatalið veksur

Fólkatalið í Nes kommunu vaks í 2005 – úr 1.215 fólkum upp í 1.231 fólk.

Í farna ári vórðu 27 børn fødd, og 8 fólk andaðust.

- Tilflytingin úr útlandinum var 29, meðan fráflytingin til útlandið somuleiðis var 29. Tilflytingin úr øðrum kommunum í Føroyum var 54 fólk – og fráflytingin úr Nes kommunu til aðrar kommunur í Føroyum var 57 fólk.

Kommunan vísir á, at hetta tilsamans gevur ein nettovøkstur í 2005 upp á tilsamans 16 fólk.

### Býarætlan

Ein býarætlan fyri alla kommununa varð løgd fram til alment eftirlit í 2004, og viðmerkingar frá borgarum til ætlanina komu inn í 2005.

- Hesar vórðu í ávísan mun tiknar við í endaligu býarætlanina, sum Innlendismálaráðið endaliga góðkendi fyri góðum ári síðan, sigur kommunan.

Soleiðis er nevnda býarætlan nú galdandi fyri Nes kommunu.

# Fimm nýggj skip komu til bygdar



*Síðan tíðliga í nítiárunum eru rættiliga nógv virkir bygd á havnalagnum á Toftum, og hesi saman við skipum og bátum eru lívæðrin í kommununi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Virkini, skipini og bátarnir saman við øðrum arbeiðsplássum á landi, eru fíggjarliga grundarlagið undir inntøkunum hjá kommununi, ásannar Nes kommuna**

KOMMUNUR
*Vilmund Jacobsen*

Síðan tíðliga í nítiárunum eru nógv nýggj virkir bygd á havnalagnum á Toftum, og nógv skip eru komin til bygdar í hesum tíðarskeiði.

- Virkini høvdu nógv virksemi í 2005, og hetta gav arbeiðsfólkinum á landi so gott sum støðugt arbeiði, sigur Nes kommuna.

Alt er sjálvandi relativt, sum klók høvd hava sagt. At støðugt arbeiði er í fiskavirkisvinnuni í eini kommunu, merkir, at hetta er støðugt í mun til arbeiði í hesi vinnu í Føroyum sum heild.

### Nýggj skip

Í ársfrágreiðingini hjá Nes kommunu fyri 2005 verður víst á, at fimm nýggj skip komu til bygdar í 2005, tríggir trolbátar og tvey línuskip, sum saman við verandi skipum góvu sjófólkunum eina góða inntøku.

- Fiskiskapurin hjá skipum og útróðrarbátum var hampiliga góður, og fiskiskapurin var nakað betri í 2005 enn í 2004. Útróðurin var eisini á leið hin sami sum undanfarin ár, og allir egningaskúrarnir hjá kommununi eru útleigaðir.

Nes kommuna leggur dent á, at virkini, skipini og bátarnir saman við øðrum arbeiðsplássum á landi, eru fíggjarliga grundarlagið undir inntøkunum hjá kommununi.